## FØÐINGAR

14. jan. fingu Beata F. og Gundur Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3600 gr.

18. jan. fingu Bozea og Jaspur, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm. og vigaði 4000 gr.

20. jan. fingu Elin Jacobsen og Martin Bogi Einarsson, Trongisvágur, tvíburar – gentu og drong. Gentan var 49 cm. og vigaði 2445 og drongurin var 48 cm. og vigaði 2190 gr.

22. jan. fingu Bjørg og Ingi Olsen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 51 cm. og vigaði 3420 gr.

22. jan. fingu Herit Poula Joensen, Leirvík og John Klein Simonsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 47 cm. og vigaði 2650 gr.

25. jan. fingu Erla Arge Jacobsen og Johnny Fisker Heinesen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm. og vigaði 2850 gr.

25. jan. fingu Anja Johannesen og Finnur Hansson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. og vigaði 3950 gr.

25. jan. fingu Saloma Johannesen og John Streymoy Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. og vigaði 3800 gr.

26. jan. fingu Áshild og Dan Joensen, Argir, ein son. Hann var 55 cm. og vigaði 3900 gr.

26. jan. fingu Annika Madsen og Jacob Jul Schrøder, Lyngby, eina dóttur. Hon var 53 cm. og vigaði 3255 gr.

26. jan. fingu Ingrid S. Mellemgaard, Argir og Bergur Andreasen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. og vigaði 3900 gr.

27. jan. fingu Eydna og John Ísheim, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 3400 gr.

29. jan. fingu Beinta Hermannsdóttir og Súni Danielsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3900 gr.

29. jan. fingu Rannvá Ólavsdóttir og Suni Hansen, Miðvágur, eina dóttur. Hon var 53 cm.og vigaði 3700 gr.

30. jan. fingu Kristina Viderø Olsen og Niklái Nysted, Skáli, eina dóttur. Hon var 51 cm. og vigaði 3750 gr.

## ANDLÁT

**23.1.**
Elsa Vang, Essa, Svínoy, 85 ár
Marius Olsen, Klaksv., bús í Mikladali, 60 ár
Karl Trúgvi Jensen, Sandi, 77 ár

**25.1.**
Súsanna Malena Ziska í Klaksvík, vanliga nevnd Sa-Malena, 87 ár

**26.1.**
Hans Jacob Debes í Tórshavn, ættaður frá Gjógv, 62ár

**27.1.**
Katrina Jacobsen, fødd Lamhauge í Søldarfirði, 97 ár.
Joen Frederik Djurhuus, Selatræ, 88 ár.
Jacob Pauli Sivertsen ættaður úr Funningi, búsitandi á Á Argjum, 88 ár

**28.1.**
Lítli Jákup Egilson, sonur Anna-Mariu og Egil Olsen, í Runavík.

**29.1.**
Niels Christoffur Debes, í Tórshavn, 78 ár.

## BRÚDLEYP

Í dag, 1. februar kl. 13.00 giftast í Miðvágs kirkju Beinta Joensen, Miðvágur og Regin Joensen, Tórshavn. Kl. 14.00 verður opið hús hjá Paulu og Karl Jóhan í Miðvági, har øll eru vælkomin. Kl. 19.00 verður døgurði fyri innbodnum á Hotel Føroyum.

Í dag 1. februar giftast Marin Mikkelsen og Karlot Hergeirsson. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 11. Opið hús verður heima hjá brúðarparinum frá kl. 17.

## TILTØK

**Gudstænastur**
**4. sunnud. eftir trettanda**
*Rituvík:* kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð
*Vesturkirkjan:* kl. 11, altarg., Heri Joensen
*Kvívík:* kl. 12, altarg., (skriftarmál kl. 11.50), Marjun Bæk
*Christianskirkjan:* kl. 11 altarg., Niels Pauli Danielsen
*Mikladalur:* kl. 12, altarg., Hans Eiler Hammer
*Selatrað:* kl. 12, altarg., Jógvan Fríðriksson
*Bøur:* kl. 12, altarg., David Johannesen
*Hattarvík:* kl. 10.30 altarg.,
*Kirkja:* kl. 12, altarg., Elsa Funding
*Bønhúsið í Øravík:* kl. 12, Jónsvein Bech (útvarpað)
*Porkeri:* kl. 12, John Myllhamar
*Havnar kirkja:* kl. 11, altarg., skriftamál kl. 10.40, Bjarni Bæk
*Kaldbak:* kl. 12, Petur Martin Rasmussen
*Skopun:* kl. 12,
*Skálavík:* kl. 17, Jákup R. Hansen
*Vági:* kl. 14,
*Hov:* kl. 16,
*Sumba:* kl. 18 Ólavur Rasmussen

**Týskvøldið 4. februar**
*Kollafjørður:* kl. 19.30, altarg., Bergur Debes Joensen

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudag kl. 11 Møti, Palle Petersen talar, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18 Møti, Elisabeth Joensen talar.
Mánadag skótamøti kl. 17 og 19.
Týsdag horn-venjing kl. 17 og 20.
Mikudag kl. 15 Bøn.

**Nardus samkoman, Tórshavn**
Húsmøti verður á Sleipnisgøtu 13a friggjakvøldið kl. 20. Evangel. fundir verða í Losjuni við Tinghúsvegin í Havn leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18. Talari verður Torkild Terkelsen.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans – ímeðan er barnaansing. Kl. 12 Sunnudagsskúli – samstundis er møti, har Virgar Hvidbro talar.
Heimasíða www.hebron.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Martin de Leur í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.
Sunnudagsskúli kl. 14.

**Samkoman Lívdin**
Sunnumorgunin í Hoyvíkar skúla, familjumøti kl. 10.30 Jens Wang talar um: Hvat segði Jesus um fyrigeving? og tilbiðjanarmøti kl. 12 Jógvan Zachariasen talar um: 1. Korintbræv – Inngangur/-tvídráttur. Barnaansing er undir báðum møtunum og sunnudagsskúli er kl. 12. Millum møtini er drekkamunnur.
Týskvøldið kl. 19.30 Bøn- og bíbliutími úti á Fløtum. Zacharias Z. undirvísir um Nehemia 4/4.
Heimasíða: www.lívdin.fo

**Meinigheitshúsið**
Missiónsvikan heldur fram hesa vikuna:
Fríggjakvøldið kl. 20 talar Torleif Johannesen og KFUM & K kórið í Klaksvík syngur.
Leygarkvøldið kl. 20 talar Tofleir Johannesen og Manskórið í Sandoynni syngur.
Sunnudagin kl. 14 er Sunnudagsskúli har Gentukórið syngur, kl. 18 talar Torleif Johannesen og Felagskór syngur. Barnaansing verður vikuskiftiskvøld.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Rhema á Hálsi**
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 ATAP Barnaklubbur.
Sunnudagin kl. 17 Familjumøti, Símin Jacobsen talar.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Heimasíðan www.rhema.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Ólavi Jacobsen (evni: Frælsi frá ótta!), kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 »Tað er vón« v/ Teddy Petersen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Paula Høj.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Týsdagin kl. 17 Frítíðararbeiði.
Mikudagin kl. 17 AWANA.
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Jóhonnu og Ámundi Berthelsen av Strondum.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børnini.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

**Aglow, Tórshavn**
Av tí at temadagurin í Aglow, ið verður tann 8. februar, longu er fullteknaður, verður dagurin tikin upp aftur tann 1. mars. Nærri verður lýst seinni.

**Várkonfirmatiónirnar 2003**
verða 30. mars, 6. apríl og 13. apríl. Konfirmantarnir skulu møta í Havnar kirkju týsdagin 4. februar kl. 15.00. Markið millum Suðurstreymoyar eystara og vestara prestagjald er Tróndargøta, Varðagøta og Villingardalsvegur.

**Zion, Kollafjørður**
Einki ungdómsmøti verður leygarkvøldið. Tí ungdómslegan er vesturi á Zarepta. Ístaðin verður møti aftur um 14 dagar.

**Aglow, Norðstreymoy**
Møti verður í Glæmuni í Kvívík leygarkvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti við Eiler Johannesen.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.
Telefonandaktin 424741.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Kajberg Davidsen o.ø.

**Mansstevna, Sørvágur**
Mansstevna verður í Sørvági í døgunum 14.-16. februar. Møtir og seminar verða í Missiónshúsinum meðan stevnuluttakararnir gista og eta á Hotel Vágum. Nærri fæst við at ringja til Harald Haraldsen á tlf. 217506 ella 314027.

**Lívsins Orð**
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 17. Liljurnar møta mánadagin kl. 17 og ungdómsbólkurin kl. 20.

**Nerija á Skála**
Á møtinum í kvøld kl. 20 og annaðkvøld kl. 17 vitja John í Skemmuni, Poul Færø og Hans Djurhuus. Verið vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Vón fyri framman við hugna, vitnisburði og sangi. Vitjan úr Skopun.
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Helga Abrahamsen.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Arna Abrahamsen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Kæri himmalski faðir! Gev mær at hvíla í tí sannleika, at tú ert hjá mær, tá grundstólparnir í mínum lívi sundur støkka. Amen

*»Mítt álit eg seti til Harrans. Hvør kunnu tit siga til mína sál: »Flýggja til fjals eins og fuglru!««*

*(Sálmur 11,1)*

Mítt álit eg seti til Harrans. Soleiðis byrjar sálmurin. Byrjanin er samstundis niðurstøðan hjá Dávidi, tá vinir og viðhaldsfólk ráða honum til at flýggja, tí vandin er stórur.

Viðhvørt tykist tað sum ein skilagóð avgerð, at vit taka okkum burturfrá. Mangan vísti tað seg, at tað, vit í fyrstu syftu mettu sum skilagott, ikki royndist sum frá leið. Ístaðin fyri at taka seg burturfrá er tað ein uppgáva at verða verandi og hava positiva ávirkan. Bæði tímiliga og andaliga er hetta galdandi sum meginregla.

Sálmurin gevur onga ábending um, hvat er áfattt. Støðan er hættislig, og skaldið er í svárari neyð. Skaldsliga verður neyðin lýst soleiðis: »Tí sí, illgerðarmenn bogan spenna, ørvar á streingin leggja fyri í myrkri at skjóta eftir rættsintum monnum! Tá grundstólparnir sundur støkka, hvat er tá rættvísur mentur?«

Vinir Dávids geva honum eitt vælmeint ráð. Tað ræður um at flýggja sum skjótast. Hetta verður væl stuðlað av spurninginum, ið ikki krevur eitt svar, tí svarið er eyðsýnt. Tá grundstólparnir sundur støkka, hvat er tá rættvísur mentur.

Myndin er fuglinum, ið flýgur til fjals er væl kend. Tá hin flúgvandi fuglurin varnast vandan, flýgur hann til fjals og fjalir seg á óatkomuligum støðum. Væl vardur í djúpum holum og gjáum.

Frá tí heimliga kenna vit myndina aftur, tá vit um várarnar ilskast inn á ravnin, ið ger seg inn á smálomb og tær ær, ið eru lambssjúkar. Veiðimaðurin veit frá at siga, at so skjótt ravnurin varnast vandan, flýgur hann burtur.

Støðan hjá Dávidi er hættislig, tí sjálvt í myrkri spenna illgerðarmenn bogan og leggja ørvar á streingin. Vandi er á ferð.

Sagt í myndatalu kenna vit nøkunlunda tað sama. Vit hava lyndi at missa móti, kenna okkum strongd, kenna grundstólparnar sundur støkka. Kenna tað trygga og fjálga farast og fara.

Í allari neyð síni kendi Dávid staðið, har hjálp er at finna. Ikki fjøllini, men Guð: »Mítt álit eg seti til Harrans«. Eisini vit vilja gera ta sannroynd, at Harrin er trúfastur og álítandi. Tað fer kanska okkurt av lagi, men vit koma aftur á slóðina til lív og trivnað.

**Jógvan Fríðriksson**



## TILTØK

**Evangeliskt møti**
verður í hølunum hjá Arbeiðarafelagnum »Hæddini« í Runavík mikudagin 5. februar kl. 19.30. Øll eru hjartaliga vælkomin. Vibeke Schaffalitzky og Inger Johanna Hildershavn.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sjómanskvinnuringarnir Hvalvík, Skálabotnur, Strendur, Selatrað og Skála samlast mánakvøldið til hugnaløtu kl. 19.30 har eru allar kvinnur vælkomnar. Kirtin og Andrias Andriasen vera við í talu og vísa ljósmyndir. Menn av Skála syngja. Innsavnan til sjómansmissiónina.

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20 við Karl Joensen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gøta**
Týsdagin kl. 20 í Glyvra-Hanusars húsi, bíbliutími: 1 Kor. 14,26-40 við Peter O. K. Olofson.

**Tofta missiónshús**
Ungdómsmøti – bilar koyra frá missiónshúsinum til Rituvíkar. Vit møtast á parkeringsøkinum kl. 19.30.

**Thabor, Fuglafjørður**
Missiónsvikan byrjar sunnudagin 2. februar við familjumøti kl. 18. Barnakórið syngur, tað verður felags náttúrði og innsavnan.
Mánadagin 3. februar kl. 20 talar Uni Næs og Thaborkórið syngur.
Týsdagin kl. 20 talar Heri Tróndheim, Hannis Hansen og Tórhild Bjarkhamar syngja.

**Tjørnuvík**
Møti verður í bygdahúsinum leygarkvøldið kl. 20 undir heitinum, Kristus er svarið, Hjarlgrim Davidsen, Margeir Toftegaard og onnur vera við. Kæri vinur, kom tú og ver við!

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudag kl. 14 Sunnudagsskúli kl. 18 Møti við Preben Hansen.
Mánakvøld kl. 20 Bønarmøti.

**Getsemane, á Brekku 19 Klaksvík**
Leygarkvøldið kl. 20 er hugnakvøld, Askham og sangbólkurin hjá Getsemane syngja. Vitnisburðar við Tominu Svøðstein, Kára Brynjar og Rikku Bringsberg. Eisini verður drekkamuður.
Sunnudagin kl. 14 er Sunnudagsskúli og kl. 18 er Møti við Unu Sigurðsson og Hannegrethu Thomasen. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 11-12.30 Barnaarbeiði (3) 4-6 ár. Kl. 14-15.30 Barnaarbeiði 1., 2. og 3. fl. Kl. 16-17.30 Barnaarbeiði 4., 5. og 6. fl.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti kl. 18 Evangel. møti.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Børnini fara í kirkju sunnudagin. Vegna missiónsviku í Øravík verður einki møti sunnukvøldið.

**Prestagarðurin á Tvøroyri**
Eldrasamkoma verður mánadagin 3. feb. kl. 16-17.30.

**Betania, Porkeri**
Kvinnumøti verður týsdagin kl. 20.

**Sion, Vágur**
Sunnumorgun kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting, kl. 18 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur við Levi Joensen o.ø.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 1.2. Fuglafjørður, tlf. 44 40 38
Sunnudagin 2.2. Skála, tlf. 44 14 90

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

## PRÓGV

30. januar tók Eyðun Klakstein prógv sum journalistur á Danmarks Journalisthøjskole í Århus.

## SILVURBRÚDLEYP

Mánadagin 3. februar hava hjúnini Sanna og Jóannes Hansen á Toftum verið gift í 25 ár. Veitslan verður fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Leirvík sunnudagin 2. februar.

**Húsavørður**
**Hervið verður søkt eftir húsavørði til Sølumiðstøðina SMS.**

Dugnaligur maskinmeistari er í starvi. Hann hevur ábyrgdina av elkervinum, maskinum og tólum.
Títt starv verður at syrgja fyri, at SMS-bygningurin annars altíð er í góðum og bæriligum standi - innan sum uttan.

Vit rokna við at tú hevur gott handalag og kanst fremja flest allar umvælingar og ábøtur, sum ein virkin gerandisdagur krevur. Ein hóskandi handverkaraútbúgving er ein fyrimunur.

Starvið er fulltíðarstarv at setast sum skjótast, men vit bíða eftir tí rætta persóninum.
Løn og arbeiðstreytir sambært avtalu.

Ert tú ein nærlagdur persónur, sum dugur at arbeiða sjálvstøðugt, ert tú vælkomin at søkja starvið sum húsavørður í SMS.
Skrivlig umsókn, sum verður viðgjørd í trúnaði, skal sendast til:

SMS
Postboks 1059
110 Tórshavn
att.: Hans Mortensen

